VALGREINAR

# Sandoyggin aftur í fokus

**Tummas Frank Joensen**
*valevni Javnaðarfloksins í Sandoyar valdømi*



Javnaðarflokkurin vil geva framhaldsskúlunum fríðan heilsugóðan kost í skúlatíðini, hettar kostar í fyrra umfari, men verður spart aftur í betri heilsu hjá børnunum seinni í lívinum. Ungdómurin er framtíðin, fáa vit hann aftur at støðast í Sandoyar sýslu, so er nógv vunnið.

Fiskavirkini skulu fáa eins góðar møguleikar, sum tey á meginøkinum, eisini skal flutningur av tí tilfeingi, sum útoyggjarnar geva, gerast fríur.

Hetta gerst við at taka av ferðaavgjaldið, sum verður goldið av hvørjum ferðaseðli til og úr landinum.

Soleiðis tryggjar Áland sínar útoyggjar.

Tá ið eg sigldi í Álandsoyggjunum við ferju, traff eg landstingsmannin fyri Áland. Vit fóru so at tosa um útoyggjatrupulleikan í Føroyum. Hann gav mær tá hettar hugskot, sum eg haldi kann brúkast her heima eisini.

# Hálvur tími frá framtíðini

**Joen Petur Petersen**
*valevni Sambansfloksins í Sandoyar sýslu*



Hvat var Skúvoyggin uttan Sildberan? »Onki« kundi svarið verið ella er svarið »Nógv«.

Ja tað kunna bara skúvingar svara uppá.

Vit sum hava búleikast á Sandoynni hava ofta sæ buldruta túrin hjá Sildberanum út ígjøgnum skúviarfjørð ja ta hevur mangan veri ringur túrur, hesin bátur ella vit kunna kalla hann fyri eitt skip hann er ótíðarhóskandi til sam-felagið sum vit liva í dag hann treingir til at blíva moderniseraðure bæði hvat viðvíkur sjúkraflutnigi at føra ein bil ja traktor út higar ja eg vil siga eitt nýtt skip.

Tað man vera sera ótíðarhóskandi at ta skula bara vera ein dag um vikuna at tú kanst fáa ein eitt akfar við fýra hjólum út higar hetta má gerast naka við og koma í rafestingan av øllum milliardum sum eru lovaðar. Hetta vil Sambandsflokkurin arbeiða fyri.

Sambansflokkurin vil at tað skula pengar setast av til at gera eitt tíðarhóskandi skip sum kann taka fleiri ferðafólk og akfør og møguliga sigla eitt sindur skjótari.

Eitt sum er sera tungt hjá teimum sum búgva á Skúvoynni eru havnarviðurskiftini har hava kanningar veri gjørdar til at fáa eitt projekt ígongd og sum eg skilji eru tær við at vera lidnar og tí er ta uppá sítt pláss at fáa hesi havnarviðurskiftin í lagi at bátar kunnu liggja trygt har sum ta er í løtuni tá ið eitt skip liggur at atløgusíðuni koyrir ta so nógv aftur og fram at ta er ringt hjá fólkið at koma íland og umborð ,eitt kann eisini leggjast avtrat at ringarnir og vilíkahald av hesi atløgusíðu kostar eini lítlari kommunu sera nógv um árið at halda hesir ringar mugu so at siga skiftast á hvørjum árið.

Bakkaverjan skal og má stuðlast byrjar man uppá nakað skal og má ta gerast liðugt hetta skal Sambandsflokkurin gera liðugt sum hinir flokkurin ikki kláraðu at gera liðugt.

Ja kanska ta er lova í so dyran men eitt er sikkurt at sambandsflokkurin vil arbeiða fyri at hetta verur gjørt.

Tí vil eg biðja um tygara atkvøðu tann 20 januar fyri at stuðla okkum til at gera hetta fyri teg í framtíðini

Vel Sambandsflokkin tann 20. januar tín trygd.

# Suðringar varið tykkum fyri sambandinum !

**Jóhanna í Ólavsstovu**
*valevni Tjóðveldisfloksins í Suðuroy*



Uttan Suðuroynna høvdu Føroyar verið fátakar !

Men tað man Sambandsflokkurin ikki halda, flestu okra munnu minnast at undan valinum fyri 2 árum síðani lovaði Lisbeth at fekk hon magt sum hon hevði agt so skuldi fyrsti leikur í talvinum verða at seta seg í samband við sponsku skipasmiðuna og avlýsað sáttmálan um bygging av nýggja Smyrli.

Og hon kann enn náa at strikað okkum av føroyakortinum. Onkursvegna skal hon fíggja handan famøsa skattareformin, sum ger at tey, sum hava lítið nú skulu fáa uppaftur minni, og tey sum frammanundan hava nógv, skulu hava uppaftur meira - tað kann í hennara hugaheimið sikkurt passandi fíggjast við at selja Smyril áðrenn okur yvirhøvur hava fingið hann.

Og Sambandsmaðurin her suðuri man heldur ikki halda oynna hava nakran týdning, jú jú sjálvandi uppundir val hevur hon týdning, tí tað er her hann hevur møguleikan fyri at verða valdur. Men ikki so skjótt er blekki á atkvøðuseðlinum torna so hevur hann stungið í sekkin og setist at stýra virkið norðanfjørðs. Hvar fóru tey gyltu vallyftini um arbeiði til allar hendur ? nei ikki nokk við at vallyftini ikki verða hildin, orkan verður harafturat brúkt til at leggja fótonglar fyri øðrum fyritakssemi í oynni. Tá Fiskasølan fór undir at keypa partin hjá Suðurís í Hvalba lovar sambandstingmaðurin at fara í tingið og støðga keypinum - hetta kundi kostað Hvalbingum eini 35-40 arbeiðspláss.

Veljarakanningarnar vísa at sambandið eftir 20 Januar fer at verða størsti flokkur í landinum - suðringa hugsið um framtíðina, hugsið um framburðin.

Veljið fólk, ið vil nakað, við oynni, fyri oynna í oynni - vel Tjóðveldið.

# Gott val allir suðringar

**Nita Næs**
*valevni Javnaðarfloksins í Suðuroy*



So er valendaspurturin næstan komin á mál. Nógv góð orð eru søgd og skrivað. Og so skal vera.

Politikarir eru fólksins tænararar, teir eiga at vilja tað góða, fyri so nógv sum møguligt.

Samfelagskøkan verður ikki býtt javnt til allir føroyingar í dag. Nøkur fáa meira, nøkur fáa minni. Javnaðarflokkurin sær tað sum sítt høvuðsmál at henda køkan verður skorin, so fólk, allar bygdir, øll øki í landinum fáa eins nógv av samfelagskøkuni.

Tað er heilt víst, at hugsa vit t.d.um flakavirkið í Vági, so hevur Vágsbygd, ikki fingið eins stóran ágóða av samfelagskøkuni sum aðrar bygdir.

Tað at trívast sum menniskja er sera týdningarmikið, vit mugu aftur fáa politikarar, sum tora at seta verulig orð og gerðir, verulig fingramerki, aftur á samfelagsgongdina. Vit er koyrd føst av politikarum, sum føra seg fram sum embætisfólk, sum einans tora at brúka orð sum karmar, mannagongdir, kassar. Politikarar, sum ikki tora at fara inn og loysa ein veruligan háttandi knút - í verki, so at øll mennsikju trívast, bæði tey frísku, sjúku, arbeiðsføru og arbeiðsleysu.

Hvat fær eitt menniskja at trívast? Hvat fær fólk í arbeiðsførum aldri at trívast? Hetta, at hava eitt arbeiði at fara upp til hvønn dag, hevur óivað stóran týdning. Hvat fær barnið at trívast? Ivaleyst trygg foreldur, hús, mat og klæði. Arbeiðsleys foreldur verða ótrygg, tá peningur manglar í til samlaðu húsarhalds útreiðslurnar. Tey hava eins høgar útreiðslur, hóast arbeiðið er vorðið óstøgugari, hóast tey eru vorðin arbeiðsleys .

Hvat fær tey eldru at trívast? Tað, at tey verða vird, sum øll onnur fólk í landinum, og kunnu fáa tær tænastur frá samfelagnum, ið tey ikki longur megna sjálvi. Eina útstrekta vinarliga hond frá almennu Føroyum, sum tey eiga rætt til, sum tey alt teirra lív hava verið við til at gjalda.

Hvat fær ein arbeiðsgevara at trívast? Vónandi ikki einans hansara persónligi vinningur, men vónandi eisini hansara hugskot og vilji, og tørvur á at hava menniskju í støðugum arbeiði.

Hvat fær ein politikara at trívast? Vónandi hansara íborðna drívmegi, sum ikki kann halda honum vekk frá at hugsa goðar politiskar tankar, um hvussu vit fáa hetta landið at hanga saman búskaparliga, mentunarliga og ikki minst menniskjaliga. Uttan menniskju, sum hava tað gott í samfelagnum, er eingin dugur í nøkrum sum helst. Og fólk missa hugin til sjálvt lívið.

Politikarar eiga ikki bert at vera myndir í bløðum ella á sjónvarpi. Nei, teir skulu ganga millum fólk, fara inn á virkir, seta seg í kantinuna á flakavirkinum og spyrja, hvat er trupulleikin her. Ein politikari skal ikki føra seg fram sum ein arbeiðsgevari, ein stjóri, ella ein løgreglumaður ella ein strangur lærari.

Nei, ein politikari, skal duga at ímynda sær eina øðrvísi støðu enn teirru, ið vit hava í dag. Tí er tað so løgið, tá ávísir politikarir, bæði kommunalir og landspolitikkarir, alment siga: Nei, hatta dugi eg ikki at ímynda mær! Nei, hatta er reinur fantasiur.

Tí í grundini er tað hugaheimur okkara, sum er keldan fyri allari nýhugsan. Javnaðaraflokkurin vil stuðla undir góðum hugskotum. Uttan fólk sum hugsa og ímynda sær, so steðgar alt lív upp.

Vit skulu, eins og norðoyingar fingu, fáa almennar pengar, møguliga sum ein grunn, sum skal hava til endamál, at arbeiði verða sett í gongd her suðuri. Hesin peningur skal ikki fara til fysiskir karmar, men til verulig arbeiðsskapandi arbeiðspláss.

Lívsins sigling er hørð! Men vit mugu frá politiskari síðu vita, hvussu vit ætla at sigla, hvaðani leiðin gongur, um tey veikastu eru við á ferðini, og at sjálv ferðin skal verða trygg, góð og møguliga eisini stuttlig.

Í góða samfelagnum vil Javnaðarflokkurn vera við til at taka hond um hesa ferð. So øll, óansæð aldur, persónliga støðu og bústað, veruliga eru við á ferðini og ikki gerast eftirbátar.

Gott Javnaðarval øll somul.



VALGREINAR

# Eitt sindur um skattalættar

**Edvin Joensen**
*valevni javnaðarfloksins í Eysturoy*



Borgarligu flokkarnir hava ført fram nakrar pástandir, ið eg kundi hugsað mær vórðu betur undirbygdir.

1. Um skatturin fer niður, fer fólk at arbeiða, so nógv meira, at landsins skattainntøka fer at økjast.
2. Um skatturin fer niður, fara íløgur í vinnulívið at økjast.

Eg búgvi í eini bygd við stórum vinnulívi, og Eysturoyggin er størsta vinnuøki í landinum. Fólk her eru von við, at til tíðir er lítið at gera, og inntøkan ikki so stór, og aðrar tíðir er nógv at gera, og møguleiki er fyri at fáa nakað av yvirtíð. Eg kenni einki til, at fólk bera seg undan at arbeiða yvirtíð. Sjálvt í 80 árunum, tá flakavinnan var upp á tað besta, og fólk arbeiddu 12-14 tímar um dagin, hoyrdist einki um, at fólk ikki fekst til at arbeiða yvirtíð.

Eg trúgvi ikki, har er meira arbeiði at heinta. Tímalønt fólk, og tað eru tey, ið kunnu fáa yvirtíðararbeiði, taka tað arbeiði, tey kunnu fáa. Hesi fólk kundu harðliga trongt til skattalætta, men eg eri bangin fyri, at landskassin ikki hevði klárað seg við tað minni í inntøku.

Um vit hyggja at teimum størru inntøkunum, sum t.d. við flakatrolarum og nótaskipum, so haldi eg, at hesir menn heldur høvdu nýtt møguleikan at ligið meira heima enn at tjent fleiri krónur, og landskassin hevði ikki verið betur fyri.

Fólk høvdu heilt einfalt ikki fingið meira arbeiði, um skatturin varð lækkaður.

Viðvíkjandi hinum spurninginum, at meira peningur millum fólk hevði verið nýttur til íløgur í vinnulívið, loyvi eg mær eisini at ivast.

Um ein vanligur lønmóttakari, hevði sloppið 20 - 30.000 kr léttari í skatti í ár, hugsi eg, at hann heldur hevði nýtt høvi til at gjørt okkurt við húsini ella skift bilin út, enn at sett peningin í okkurt vinnutól.

Í mínari verð er einki, ið bendir á, at skattalætti til lønmóttakarar skapar fleiri arbeiðspláss.

Hinvegin gongur Javnaðarflokkurin fult inn fyri, at vinnan ikki skal skattast ov hart. Hon skal hava loyvi til at leggja pening til síðis í góðum tíðum, so kapitalur er til ábøtur og íløgur, tá neyðugt er.

# Ábyrgd er eitt lyklaorð

**Hanna Jensen**
*valevni fyri Fólkaflokkin í Eysturoy*
*http://hanna.folkaflokkurin.fo*



Einstaklingurin hevur ábyrgd, og hon skal ikki takast frá honum.

Hin einstaki skal hava frælsi til sjálvur at leggja síni viðurskifti til rættis eftir evnum, vilja og undir ábyrgd fyri sær og sínum.

Hin einstaki hevur ábyrgd av sær sjálvum, foreldur hava ábyrgd av sínum børnum, tey avvarðandi hava ábyrgd av teimum sjúku og teimum eldru. Leggja vit okkum ikki hetta í geyma og halda fast við tað, so taka vit ábyrgdina frá fólki, og geva samfelagnum alla ábyrgd - samfelagið, sum tó ikki er nakar persónur við kensl-um, sum umsorgan og ábyrgd. Samfelagið er tú og eg og allir vit einstaklingar til saman, og tí mugu vit leggja dent á, hvørja ábyrgd hin einstaki hevur, áðrenn alt samfelagið skal koma inn í myndina. Fáa vit ikki hin einstaka, og familjuna til at taka initiativ og ábyrgd, so verður í veruleikanum einki samfelag, tí hvussu skal samfelagið - sum er einstaklingarnir, familjurnar, øll tilsaman - tá kunna virka?

Um tað almenna skal hava alla ábyrgd, gerst almannaøkið ov stórt og tungt at reka, og tað rákið kenna vit.

Hitt almenna skal taka hond um, har verk hins einstaka ikki røkkur, har ein tørvur er.

Ábyrgd eyðkennir føroyingar, so latið okkum halda fast við hana!

Hetta er grundleggjandi Fólkaflokshugsjón.

# Menning og vitan

**Klæmint Olsen**
*valevni Sjálvstýrisfloksins í Suðurstreymoy*



Í hesum døgum eru liðin 115 ár, síðan Føroyingafelag var sett á stovn; hetta sum eitt úrslit av jólafundinum í 1888. Felagið fekk stutta og turbulenta livitíð, men avleiðingin var, at tveir politiskir flokkar sóu dagsins ljós í 1906: Sambandsflokkurin og Sjálvstýrisflokkurin. Flest allir seinnu flokkar í 20. øld eru sprotnir úr Sjálvstýrisflokkinum.

Mál Sjálvstýrisfloksins var, at Føroyar skuldu gerast sjálvbjargnar, og at lívgast skuldi um føroyska mentan og siðaarv. Ikki bara við at varðveita, men við at menna fyrst og fremst skúlan, herundir málið. Hetta var tó ikki alt, føroyingar skuldu ríka sítt andslív við tí besta úr útlendskari mentan.

Hugsið einferð um ta menning, føroyska samfelagið hevur verið fyri síðstu 150 árini. Frá einum miðaldarsamfelag eru vit í dag eitt nýmótans samfelag, ið tolir samanbering við londini um okkum. Ja, mong eru helst tey, ið øvunda okkum at liva í einum landi, ið hevur so nógv at bjóða, einum landi við so høgari lívsgóðsku.

Enn hevur Sjálvstýrisflokkurin sum mál at røkja mentanararvin. Men Føroyar eru í dag partur av altjóðasamfelagnum. Kunningartøknin ger, at tað í nógvum viðurskiftum er minni munur á at búgva í einum evropeiskum stórbýi og í einari føroyskari bygd.

”Vitanarsamfelagið” kallast tað. Vit eru longu partur av tí, men vit mugu áhaldandi tryggja eina menning. Fyrimunirnir eru nógvir, eitt nú kanst tú lesa á hægri læristovni uttanlands frá stovu tíni heima við hús.

Men har eru eisini stórar avbjóðingar. Ein treyt er, at myndugleikarnir tryggja, at øll hava lætta og bíliga atgongd til samskiftiskervið. Ein onnur, at okkara skúlar eru nóg væl útgjørdir, og at øll fáa dygga frálæru. Vit mugu ikki, sum tað sæst aðrastaðni, koma í ta støðu, at vit fáa fyrsta floks borgarar og annan floks borgarar. Tey, sum duga at nýta nýta nýggju tøknina, og tey, sum ikki duga.

Tíverri sær ikki út til, at tann politiski myndugleikin er nóg virkin á hesum øki. Serliga tilvildarlig tykist útbyggingin av kervinum.

Menning er eisini at ásanna sínar avmarkingar. Vit hava ikki ráð til alt tað, ið onnur størri lond hava. Tí mugu vit hava gott samstarv við veitarar og skúlar uttanlands.

Sum fyri 100 árum síðan vil Sjálvstýrisflokkurin framburð fyri Føroya fólk. Sjálvstýrisflokkurin vil menna okkara samfelag, vinnuliga og mentanarliga, og - tá ið tíðin er búgvin - lata Føroya fólk sjálvt gera av, um tað ynskir fult politiskt frælsi.

Veljarar um alt landið. Latið tað gamla sjálvstýristræið liva. Set kross við Sjálvstýrisflokkin, lista D, á valdegnum tann 20. januar.

# Umhvørvi og náttúra

**Eyðun Elttør**
*landsstýrismaður og valevni Sjálvstýrisfloksins í Norðoyggjum*



**Havumhvørvi**

Havumhvørvismál yvirtikin sum føroyskt málsøki í januar 2003.

Yvirtøkan hevur týdning, tí við henni hava vit fulla ábyrgd av økinum.

Kunngerðir eru klárar at seta í gildi m.a. um

- bunkring av olju í føroyskum havnum,
- burturkast frá skipum,
- útlát av olju frá skipum

Í samband við yvirtøkuna varð í mai 2003 samstarvsavtala undirskrivað millum føroysku og donsku umhvørvismálaráðini. Endamálið er at tryggja, at Føroyar eru við tá altjóða avtalur og sáttmálar verða fyrireikað, soleiðis at vit kunnu tryggja, at atlit verður tikið til serføroysk áhugamál og at Føroyar fáa betur høvi at ávirka altjóða arbeiðið á umhvørvisøkinum

**Varandi orkukeldur**

Í september 2003 hevði eg heiðurin at byrja framleiðsluna av vindorku frá trimum vindmyllum hjá Sp/f Røkt á Mýrunum omanfyri Vestmanna. Hesar 3 myllur kunnu dekka 3% av samlaða orkutørvinum í Føroyum.

Vit skulu tryggja, at orkuframleiðslan í Føroyum er so burðardygg sum gjørligt, soleiðis at $CO_2$ útlátið kann lækka.

Vit eru við í fleiri øðrum verkætlanum innan burðardygga orkukeldur, m.a.

- Framleiðsla av elmegi úr aldum
- Nýtsla av vetni sum orkukelda umborð á fiskiskipum.

Vit skulu hava orðaskifti um ein framtíðar orkupolitikk. Ein møgulig liberalisering og harvið kapping á elmarknaðinum skal stava frá reinum orkukeldum.

**Olja**

4 brunnar eru boraðir, olja er funnin, og vit hava staðfest, at føroyska undirgrundin inniheldur eina virkna kolvetnisskipan.

Arbeiðið hjá oljufeløgunum hevur eisini givið okkum týðandi upplýsingar um undirgrundina, sum verða brúktir í samband við fyrireiking av framtíðar oljuleitingum.

**Oljuleiting á føroyskum øki heldur fram**

- nýggjar arbeiðsskráir fyri 9-ára loyvini eru avtalaðar millum Oljumálaráðið og loyvishavararnar
- Jarðfrøðisavnið hevur fingið tilmæli frá oljufeløgum um framtíðar leitiøkir.

**Samstarv við fiskivinnu og fiskivinnufeløg**

Eitt gott samstarv við fiskivinnuna er neyðugt. Eg havi lagt stóran dent á at kunna fiskivinnuna um virksemið á oljuøkinum. Tað er av týdningi ikki at gloyma fiskivinnuna, sum er okkara livibreyð, nú farið er í holt við oljuleiting.

**Útjaðarin**

Fyri at tryggja menning og trivna á útoyggj er neyðugt við góðum arbeiðsplássum, einari støðugari samferðslu og einum álítandi samskifti. Eg havi tikið stig til at seta ein millumráðsbólk, sum skal samskipa útjaðarapolitikkin hjá teimum ymsu aðalráðunum, soleiðis at atlit verður tikin til tørvin hjá fólkunum, sum búleikast á okkara útoyggjum.

Ein reglugerð fyri stuðli til útoyggjamenning er klár at seta í verk. Fyribils hava vit 300.000 kr., sum skulu nýtast til at stuðla tiltøkum, til frama fyri menning av útoyggjum. Henda upphædd skal hækkast, men er eitt stig á vegnum.

VEL SJÁLVSTÝRISFLOKKIN 20. JANUAR - tann gongda leiðin